Sir Frederick Cecil Mason (15. mai 1913 – 18. januar 2008) var bretskur diplomatur. Mason kom til Føroya sum bretskur konsul. Í 1943 verður hann útnevndur til bretskan konsul í Colón í Panama. Seinni, tá hann varð heiðraður sum Sir Frederick Mason CMG, var hann útnevndur sum bretskur ambassadørur í Kili - frá 1966 - 1970, og at enda sum bretskur umboðsmaður í Geneva hjá Sameindu Tjóðum frá 1971-73.

Fakta:

- *Kríggið var Føroyum dýrt. Skip, ið fiskaðu ella sigldu við fiski til bretskar havnarbýir, vórðu minusprongd, torpederað ella søkt av kavbátum, onnur vórðu álopin av flogførum, ið kastaðu bumbur og skutu við maskinbyrsum. Triðingurin av føroyska fiskiflotanum fór á havsins botn, og 150 mans í bestu árum doyði.*

- *Síðan 1947 hevur 25. apríl verið hildin sum føroyskur flaggdagur. Í sambandi við, at heimastýri varð sett á stovn í 1948, var Merkið endiliga viðurkent av donskum myndugleikum sum tjóðarflagg føroyinga.*

»Det er et yndigt Land«

Var svarið hjá Dimmalætting til flaggspurningin

Flestu forsíður á føroysku bløðum eftir 25. apríl 1940 viðgjørdu flaggspurningin. Dagblaðið skrivaði um fólkafundin á Vaglinum, har eini 7-800 fólk høvdu samtykt, at Merkið skuldi verða góðkent sum flagg føroyinga.

Sosialurin skrivaði eisini um málið. Blaðið harmaðist um, at summir menn her á landi »aldri kundu vera "nationalir" uttan við rumbli á rangum og ósonnum grundarlag«.

Tingkrossur heiðari málinum við eini tekning við seks føroyskum fløggum og eini yrking, sum skaldið Hans Andreas Djurhuus hevði yrkt til høvið.

Men Dimmalætting skrivaði als ikki um málið. Á forsíðuni 27. apríl hevði Dimmalætting tvær søgur frá fyrra heimsbardaga, onnur »Klokke, ring og Fred«, hin nevndist »Den lange Nat í Flandern«.

Men svarið frá Dimmalætting kom kortini 30. apríl. Sambandsmenn vóru sum kunnugt ímóti flagginum og ímóti, at Merkið skuldi verða flagg føroyinga. Meirilutin í Landsnevndini hjá Løgtinginum, Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin, heittu á kvødlið 24. apríl í 1940 á bretska hersetingarvaldið um at góðkenna flaggið.

Svarið hjá Dimmalætting 30. apríl var at prenta danska tjóðsangin, »Det er et yndigt Land« við stórum stavum innrammað á forsíðuni – og annars ikki eitt einasta orð um føroyska flaggið, sum nú varð góðkent sum tjóðarflagg føroyinga.

